Hús í Vestmanna til sølu

Vegna Føroya Skiftirætt verður hendan ognin lýst til sølu.

Tað stendur skiftirættinum frítt at velja ímillum innkomin tilboð og ongum at taka av.

Hús í Vestmanna:

Við hesum verður sethúsaognin matr.nr. 148 d og 176, í Vestmanna lýst til sølu.

Grundøkið er tilsamans 656 m². Húsini eru umleið 60m² í kjallara, miðhædd og lofti.

Kjallari: Óinnrættaður.

Miðhædd: Gangur, baðiverilsi, køkur og 2 stovur.

Loft: Úti á lofti, hjúnarúm og 2 kømur.

Talan er um eini eldri hús, ið standa væl fyri og við sera góðum útsýni.

Á ognini er stórt úthús.

Nærri upplýsingar um omanfyri standandi ogn fáast við at venda sær til undirritaðu..

Advokatskrivstovan
Fr. Petersensgøta 9
100 Tórshavn · Tlf. 311145

Halgir Winther Poulsen, adv. Magnus S. Petersen, adv.
Fríða Patursson, adv. Ó. J. Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv. Niels Winther Poulsen, adv.

<ph_1>

<ph_1>

<ph_1>

2. hvønn mikudag

Tað er feitt

<ph_1> <ph_1> <ph_1> <ph_1> <ph_1> <ph_1>

Haldið Sosialin!

400,- kr. um ársfjórðingin

- sparið 380,- kr. í mun til leysasølu

600,- kr. um ársfjórðingin í Danmark
(500,- kr. fyri 1 ferð um vikuna - 5 bløð)

Sosialurin

Ókeypis
Verður sent óposteð
Sosialurin rindar postgjaldið

64

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn

Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fái bløðið 5 ferðir um vikuna.

Navn:
Bústaður:
Postnr.:
Bygd/býur:
Telefon nr.:
Undirskrift:

TEKNISKI SKÚLIN
TÓRSHAVN

Norðoyingar

Týsdagin 11. mars kl. 19.00 verður fundur á Tekniska Skúla í Klaksvík, har evnið er:

Framleiðslutøkningur:
– hvat er tað?

Fundurin er mest ætlaður fólki við:

- Handverksútbúgving
- HF-, Student-, HT-, Atstøðisprógvi
- Líknandi útbúgving

Høvi verður at seta spurningar

Øll eru hjartaliga vælkomin

TEKNISKI SKÚLIN TÓRSHAVN
Marknagilsvegur 75 · Postsmoga 239 · FO – 110 Tórshavn
Telefon + 298-31 19 57 · Telefaks + 298-31 66 21
tst@tst.fo · www.tst.fo

www.sosialurin.fo

Vaskifólk

Fiskamarknaður Føroya á Toftum søkir eftir fólki at vaska skiljilinjurnar beinanvegin.

Vaskiarbeiðið er um kvøldarnar og onkran leygardag.

Hava tit nakrar spurningar, so kunnu tit ringja 223804.

Møguligar umsóknir skulu sendast til Fiskamarknað Føroya á Toftum.

Til sølu

Sethús og tvey grundstykki í Tippinum í Vági til sølu.

Áhugað kunnu ringja **tlf. 314633**

Bakaralærlingur

Okkum tørvar ein raskan bakaralærling. Hevur hettar tín áhuga so ring ella skriva til:

Pf. Frants Restorff
Tórsgøta 13 · Postsmoga 41
110 Tórshavn · Tlf. 311060

frants restorff

Lesið Sosialurin -tað loysir seg

Eitt klipp fyri javnrætti

Tjaldrið hevur nógvar dygdir, sum høvdu ríkað samfelagið, um vit góvu teimum gætur, segði Annika Wardum Joensen á Grækarismessuhaldin um í Havn sunnudagin og vísti á, at bøgan og steggin eru felags um umsorganina fyri sínum ungum

GRÆKARISMESSA
Ingi Rasmussen

Annika Wardum Joensen helt Grækarismessurøðuna í ár

Mynd: Ingi Rasmussen

Tjaldrið hevur fleiri dygdir, sum vit í Føroyum meta høgt, og sum vit stremba eftir at hava í okkum. Tað er dugnaligt, tað dugir at navigera, og so er tað áhaldandi.

Millum annað hetta segði Annika Wardum Joensen, sum helt Grækarismessurøðuna á Vaglinum í ár.

Grækarismessa er ikki fyrr enn í morgin, 12. mars, men sjálvt haldið var sunnudagin 9. mars, dagin eftir altjóða kvinnudagin. Og nú tað var forkvinnan í Javnstøðunevndini, sum røddi, so var sjálvsagt, at komið var inn á spurningin um javnrætt millum kynini. Eisini í hesum sambandi, er tjaldrið góð fyrimynd, visti Annika Wardum Joensen okkum at siga.

– Tjaldrið hevur aðrar dygdir, sum vit enn ikki hava tikið til okkum, men sum kundu ríkað samfelagið, um vit góvu tí gætur. Nevniliga ta dygd, at bøgan og steggin eru felags um at reiðrast, bøla og fáa føði til ungarnar.

– Júst sum kona og maður í dag eru felags um at fáa inntøkur til húsarhaldið, skulu vit eftir mínum tykki leggja okkum meira eftir at vera felags um at hava umsorgan fyri børnunum, teimum eldru og øðrum, sum hava tørv á okkara hjálp. Tá menna vit eitt samfelag, har innlivan ella empati er ein sjálvfylgja og gott hjartalag ein dygd, segði Annika Wardum Joensen í sínari hugvekjandi røðu.

Hóast sunnudagurin var nakað vátur, so var turt og so nøkunlunda stilt ta løtuna, tá skótar, hornblásarar og hugagóð fólk hittust á Vaglinum at heilsa tjaldrinum vælkomnum heim.

Í ár vóru 60 ár liðin, síðan Sverri Patursson sáli helt ta fyrstu Grækarimessurøðuna, og tað nýtti Annika Wardum Joensen høvi til at minnast afturá. Tíðarleysa røðan frá 1943 er eins viðkomandi í 2003 og umrøddi evnini at kenna frið og gleði og tokka til náttúruna. Sverri Patursson hevði stóran alsk til náttúruna og fuglarnar, sum her eru. Í røðuni fyri 60 árum síðan heitti hann á øll um at sýna náttúruni og serliga fuglunum virðing, so tey komandi ættarliðini eisini fingu eitt vakurt land at búgva í.

Ta áheitanina bar Annika Wardum Joensen víðari.

KT-fólk til Føroya Tele

"Standum vilja vit ikki vita av einum hugskoti – bert tí at okkum ikki líkar framberingina av tí"
Friedrich Nietzsche



Føroya Tele er ein fjarskiftisfyritøka í stórari menning - í kapping við aðrar fjarskiftisfyritøkur í einum nú liberaliseraðum marknaði.
Alt fleiri tænastur og veitingar standa kundunum í boðið, og hetta krevur meira av øllum pørtum í fyritøkuni.

Ikki minst er hetta galdandi fyri KT-deildina, sum er ein týðandi partur av flestu verkætlanum okkara. Vit søkja tí eftir einum starvsfólki, sum kann vera við at loysa uppgávurnar á deildini.

Ein av mest týðandi uppgávunum fyri deildina er at reka ERP-skipanina hjá Føroya Tele, Oracle Applications og í tí sambandi at rita og menna loysnir til billingskipanina, sum vit sjálvi hava ment sum ein partur av Oracle Applications.

Eisini loysa vit aðrar KT-uppgávur við tilknýti til menning og viðlíkahald av televeitingum og tænastum. Nýggja starvsfólkið skal m.a. vera við at menna og rita slíkar loysnir.

Í samband við hetta verður arbeitt við:
· Oracle Applications
· Oracle forms, Reports, PL/SQL
· Web menning
· Oracle Dátugrunnum
· Unix (HP-UX, SOLARIS, LINUX)

Nýggja starvsfólkið kann vera nýútbúgvin verkfrøðingur, cand. merc. dat., datalogur ell. líknandi.

Royndir telja eisini við í metingini.

Vit skipa fyri neyðugari útbúgving og skeiðum í samband við arbeiðið.

Løn eftir førleika.

Nærri fæst at vita frá Michael Thomsen, mth@ft.fo, ella Starvsfólkadeildini á tlf. 303030.

Umsóknir við avritum av prógvum og ummælum skulu vera Føroya Tele í hendi í seinasta lagi 24. mars 2003 og skulu stílast til:

Føroya Tele
att. Starvsfólkadeildin
Postsmoga 27
110 Tórshavn

FØROYA TELE
Skapið framtíðina saman við okkum!